

## 723 atkvøtt fyrsta tíman

Eftir at valstøðini í Tórshavnar Kommunu hava verið opin í ein tíma, hava longu verið 723 fólk verið inni á gátt og greitt teirra atkvøðu, hetta skrivar heimasíðan hjá Tórshavnar Kommunu, www.torshavn.fo. Umframt hetta hava 516 atkvøtt við brævatkvøðu. Í 2004 vóru 732 fólk fyrsta tíman og hetta er næsthægsta talið nakrantíð fyri tíðina millum 10-11 á kommunuvali. Mest vóru hendan tíman í 2000, heili 771 fólk. Gongur eftir sama leisti, sum fyri fýra árum síðan, verða flest fólk í valhølinum seint út á seinnapartin. Millum klokkan 16-18 kommuvalsdagin í 2004 atkvøddu 2.800 fólk. Nógv bíða tó til seinastu løtu, upp undir tá valstøðini lata aftur klokkan 20.

# Plakatirnar hava sín týdning

**Fá vilja ganga við til, at ein stór plakat ella lýsing er tað, ið avgerð hvørjum teirra atkvøða gagnar, men tað vísir seg, at allar lýsingar ávirka á onkran hátt. Árið í ár er ikki nakað frávik, tá hugsað verður um plakatir, men rákið hevur við sær, at lýsingarherferðin eisini gongur fyri seg á alnótini**




*Til hvørt val verða plakatir við lyftum, andlitum og stavum hongdar upp í hópatali, men ivasamt er, um hetta er besti hátturin at gera vart við seg.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**BÝRÁÐSVAL**

*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

- Hóast eg ikki heilt minnist hvussu tað var síðst, so havi eg kensluna av, at fleiri lýsingar eru at síggja hesuferð. Valevnini hava eisini gjørt meira burturúr, lýsingarnar eru størri og líkjast teimum, sum eru at síggja til løgtingsval, sigur Kári Durhuus.

Hinvegin metti Øssur Wintereig, tíðindamaður, at í Havnini merkist valið eins nógv sum seinast. Tó tyktist tað honum, sum tað hevur verið heldur tamt um restina av landinum. Frá støðum sum Runavík og Klaksvík, har stór útskifting kann væntast, hevur verið lítið at hoyrt.

- Eg havi upplivað, sum til hvørt val, at eg eri koman at kenna fleiri nýggj andlit og nøvn, orsakað av stórum plakatum, sigur Øssur Wintereig. Serliga eru tað tey nýggju og ungu fólkini, ið koma til sjóndar. Hesar lýsingarnar gera, so fólk byrja at spyrja hvørji hesi eru og hvørjum tey standa fyri. Men hvussu nógvar atkvøður ein plakat gevur er sera ivasamt, greiðir hann frá.

Ymiskt er eisini hvussu lýsingarnar verða móttiknar. Til dømis nevnir Øssur Wintereig, at fleiri av plaktum Fólkaflokksins ikki fullu í hansara smakk,

- Svørtu litirnir, myrku myndirnar, myrki teksturin, tær eru beinleiðis óhugnaligar. Á summum øðrum er so at siga øll valskráin skrivað við smáum stavum, so tað als ikki ber til at lesa, tá man koyrir framvið. Men summi andlit tó hava verið sera sjónlig, sjálvandi Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Ella Müller, sum hevur plakatir, heilt øðrvísi enn hini í Fólkaflokkinum, hava verið lætt at fáa eyga á, sigur Øssur Wintereig.

Um júst hetta slagið av lýsingum hevur verið nakað øðvísi í ár, vóru teir báðir Kári Durhuus og Øssur Wintereig á einum máli um, at tað var nakað tað sama sum undanfarin ár.

### Flutt valstríð

Tó er tað ein sannroynd, at fleiri og fleiri valevni nýta aðrar vegir enn prentaðar lýsingar í síni herferð. Miðlaheimurin er kollveltandi nógv broyttur seinastu árini og neyðugt er at vera alla staði. Hann metti tað ikki bera til at siga hvar lýsingarnar muna best, tí møguleikarnir eru so fjølbroyttir. Fleiri og fleiri valevni, serstakliga tey yngru, nýta samskiftistól sum MySpace og Facebook, har tað ber til at raka júst ynskta málbólkin og eisini raka persónligt.

- Í dag er tað nógv torførari, tí ofta kunnu veljararnir svara aftur og seta spurningar, valevnini mugu alla tíðina vera tilreiðar. Hóast broytingin kundi tikið nakað av orkuni, ið annars hevði farið til plakatir, so tykist hetta ikki at vera støðan, greiðir Kári Durhuus frá.

### Týdningarmikið

Spurnartekin er ofta sett við, hvussu stóra ávirkan lýsingarnar í veruleikanum hava, men tað er eingin ivi um at tær eru eitt hent amboð hjá valevnunum. Kári Durhuus vísir á, at tað er umráðandi hjá valevnunum at byggja sítt trúvirði upp.

- Lesarabrøv, kjak og upplýsing um síni mál, tað hevur eina styrkjandi virkni at vera sæddur.

Øssur Wintereig ivaðist ikki í, at tað hevði týdning at valevnini nýta plakatirnar til at gera vart við hvørjum lista tey verða at finna á.

- Avmarkaða valdið hjá kommununum ger, at munurin á flokkunum er lagt frá so stórur, sum hann er til eitt nú løgtingsval. Hjá summum er tað týdningarmikið at gera vart við hvørjum lista tey eru á, tildømis sá eg eina av Heðini Mortensen, har tað stóð við stórum »er á lista C«.

